## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og suðri og stundum regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Einki tilboð til landsstýrið

**Anders Fogh Rasmussen kemur fyrst og fremst til Føroya at lurta eftir føroyingum. Hann skal hitta bæði landstýrið og føroysku andstøðuna, og hann hevur einki tilboð við til landsstýrið.**

CHRISTIANSBORG
*Magnus Dam*

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, kemur mánadagin til Føroya á arbeiðsvitjan. Hann kemur til Føroya mánadagin og fer avstað aftur týsdagin. Anders Fogh Rasmussen hevur frá fyrstan tíð sagt seg vilja leggja dent á at bøta um spentu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Tað er fyrst og fremst við hesum í hyggju, at hann kemur til Føroya, hálvan-annan mánað eftir at hann gjrødist forsætisráðharri.

Í Føroyum skal hann hitta Anfinn Kallsberg, løgmann, og harumframt skal hann hava fundir við umboð fyri andstøðuflokkarnar á løgtingi.

- Eg havi frá byrjan av lagt dent á at fáa samrøður í lag við løgmann og flokkarnar í Føroyum. Eg fari at lurta eftir, hvat løgmaður hevur at siga, og hvat hinir flokkarnir hava at siga, segði Anders Fogh Rasmussen á tíðindafundi í Forsætisráðnum í gjár.

### Ongar samráðingar

Talan verður ikki um veruligar samráðingar um framtíðarstøðu Føroya á vitjanini hjá forsætisráðharrnum. Spurdur, um hann hevur nakað tilboð við til Anfinn Kallsberg, løgmann, svaraði Anders Fogh Rasmussen, at tað hevur hann ikki. Endamálið er fyrst og fremst at lurta eftir, hvat føroyingar sjálvir vilja, segði hann.

Tá ið Anders Fogh Rasmussen sat í andstøðu áðrenn fólkatingsvalið í fjør, tók hann eins og meirilutin í Fólkatinginum undir við Føroyapolitikkinum hjá Poul Nyrup Rasmussen og undanfarnu stjórnini. Spurdur, um hann hevur broytt støðu til Føroyapolitikkin, sigur forsætisráðharrin, at tað hevur hann heldur ikki gjørt.

- Útgangsstøðið er framvegis tað sama sum hjá Nyrupstjórnini. Men orðalagið millum stjórnina og landsstýrið hevur verið óneyðuga negativt, haldi eg, og tað er hetta, sum eg fari at royna at bøta um, sigur Anders Fogh Rasmussen.

Umframt vitjanina mánadagin, kemur forsætisráðharrin helst aftur til Føroya seinni í ár á eina almenna vitjan.



*Anders Fogh Rasmussen hevur einki tilboð í skjáttuni, tá hann mánadagin kemur til Føroya á vitjan. Hann fer fyrst og fremst at lurta eftir føroyskum samgongu- og andstøðupolitikkarum.*

Radio-verkstaður
Umvæling av:
● Sjónvarpum
● Videotólum
● Hi-Fi
Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki
Fokus ELEKTRONIK
Reynstún 19 · Argir
Tlf. 311306 - Fax 311306

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 7 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 5 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | ÷1 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷23 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷10 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 7 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 1 |
| Miami | 18 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtýst, 982 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og dýpist nógv.




Eitt lágtrýst norðan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/01 kl. 06[00]– 08/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,3°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: < 0,1 mm – mált frá 07/01 kl. 06[00]– 08/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 15,7mm

BILLUTIR

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

### VESTFALLSKYRRINDI

2. jan.: Mánin n. jørðini/Jørðin n. sólini
6. jan.: Seinna kvarter
13. jan.: Tendring
18. jan.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. jan | 03.05 | 15.30 | 02.05 | 14.30 | 02.20 | 14.45 | 05.05 | 17.30 | 06.05 | 18.30 | 01.20 | 13.45 | 00.20 | 12.45 | 03.20 | 15.45 | 04.20 | 16.45 | 02.50 | 15.15 | 04.05 | 16.30 |
| 10. jan | 03.55 | 16.20 | 02.55 | 15.20 | 03.10 | 15.35 | 05.55 | 18.20 | 06.55 | 19.20 | 02.10 | 14.35 | 01.10 | 13.35 | 04.10 | 16.35 | 05.10 | 17.35 | 03.40 | 16.05 | 04.55 | 17.20 |
| 11. jan | 04.44 | 17.09 | 03.44 | 16.09 | 03.59 | 16.24 | 06.44 | 19.09 | 07.44 | 20.09 | 02.59 | 15.24 | 01.59 | 14.24 | 04.59 | 17.24 | 05.59 | 18.24 | 04.29 | 16.54 | 05.44 | 18.09 |
| 12. jan | 05.36 | 18.03 | 04.36 | 17.03 | 04.51 | 17.18 | 07.36 | 20.03 | 08.36 | 21.03 | 03.51 | 16.18 | 02.51 | 15.18 | 05.51 | 18.18 | 06.51 | 19.18 | 05.21 | 17.48 | 06.36 | 19.03 |

5 707265 100036 >